Sjónarmið

Viðmerkingar til eina møguliga føroyska oljuvinnu

Fáa føroyingar ikki ognarrættin til oljuna, verður ein møgulig oljuvinna ikki upp á føroyskar fortreytir, og avkastið endar hjá dønum. Undirgrundin kemur at verða rænd skrivar Jóannes Eliasen

Nakrar stuttar, generellar

viðmerkingar til eina møguliga komandi oljuvinnu í Føroyum.

Tá ið oljuvinna skal planleggjast í einum landi, er tað nóv løgarliga, umsitingarliga og á frálæruøkinum ið skal upp á pláss, og serliga er hetta galdandi, tá ið ein er í einum so lítlum landi sum Føroyar.

Nakað av tí umsitingarliga er komið upp á pláss, og tann týdningarmesti løgarkarmurin um eina oljuvinnu á sjónum, øll licenslóggávan (tann konsessiónspolitiski karmurin), sum er tann lógarkarmur, sum fastleggur treytirnar fyri, hvussu »teigarnir« verða útbjóðaðir, eins væl og skattalóggávan, tryggingarlóggávan, umhvørvislóggávan o.s.fv., koma skjótt fyri í tinginum.

Hetta er alt samalt gott, og alt hetta arbeiði er sera týdningarmikið og skal gerast út frá teirri høvuðsfortreyt, at vit eru í einum sera lítlum landi. Eg ynski teimum, sum fáast við hetta, alla lukku, og at teir koma at gera eitt arbeiði, landinum til frama.

Ognarrætturin

Men eg ynski at draga ein prinsipiellan spurning fram her og viðgera hann stutt. Tað er ognarrætturin til møgulig oljuríkidømi undir Føroyum.

Eg meti, at hesin spurningur er altavgerandi í sambandi við eina møguliga komandi oljuvinnu í Føroyum. Hvør eigur oljuna? Eru tað vit, ella eru tað danir?

Eg reisi hesar spurningar, tí tann, sum eigur, hann ræður og disponerar.

Fortreytin fyri dispositiónsrættinum er ognarrætturin. Tann, sum eigur ein lut, hann disponerar og ræður yvir honum. Tí er mín niðurstøða:

Fortreytin fyri, at vit kunnu stýra eini møguligari oljuvinnu, er, at hon kemur at verða upp á okkara fortreytir, at vit fáa avkastið av henni er, at vit hava ognarrættin yvir oljuni. Og tað er ikki ein útdelegeraður »ognarrættur«, men ein veruligur ognarrættur.

Ognarrætturin til undirgrundina í Danmark

Undir núverandi heimastýrisskipan hava føroyingar ikki veruligan ognarrætt yvir nøkrum í Føroyum og heldur ikki undirgrundini.

Vit hava fingið eina avtalu við danir um undirgrundina. Vit hava fingið útdelegerað ávís rættindi frá dønum, men her eru fleiri »klausular« á, og danir kunnu sum altíð við eini útdelegering seta føroyingar frá valdinum, um teir ikki makka rætt. T.v.s. vit hava, sum nú er, ikki veruligan ognarrætt yvir einum møguligum oljuríkidømi, í staðin hava danir ognarrættin.

Oljuvinna upp á danskar fortreytir

Og tí skal tað vera mín pástandur, at verður núverandi skipan galdandi framyvir, so koma danir framvegis at hava ognarrættin til oljuna, og so kemur oljuvinnan at verða løgd til rættis samsvarandi teirra fortreytum, og teir koma at taka alt avkastið.

Ein skal minnast til, at hetta er ein stór vinna, og føroysk og donsk áhugamál í hesum máli eru als ikki tey somu, og tey kunnu als ikki foreinast. Ein stór oljuvinna tænir áhugamálunum hjá dønum. Og tí koma danir at ynskja eina stóra oljuvinnu t.d. á støddi við ta hetlendsku upp á einar 50 miljardir árliga í framleiðslu. Skattaavkastið verður so 10 miljardir árliga, og lønaravkastið kann verða 10-15 miljardir árliga, um vit rokna við 40.000 arbeiðsplássum.

Men hvat skal føroyska samfelagið gera við eina vinnu av hesi støddi?

Vit fáa molarnar

Vit koma undir eini slíkari skipan at fáa tann allarminsta partin av hesum sjálvir - bert nakrar molar eins og hetlendingarnir - og støddin á hesi vinnu kann ikki tilpassast føroyska samfelagnum. Undirgrund okkara kemur at verða tømd upp á heilt stutta tíð (20-40 ár), júst sum í Hetlandi, og vit gerast sum Hetland ein útpínd región.

Bruttoframleiðslan av olju í Hetlandi er umleið 50 miljardir, og avkastið í lønum og skattum. Til Bretland umleið 30 miljardir, alt íroknað (bretsk tøl), til Hetland umleið hálv miljard.

Vit kunnu eisini sammeta okkum við Ný Foundland, sum upplivir nakað tað sama sum Hetland.

Oljuvinna upp á føroyskar fortreytir

Fáa føroyingar ognarrættin til møgulig oljuríkidømi, so kunnu vit heraftur ímóti stýra oljuvinnuni, leggja hana til rættis samsvart føroyskum fortreytum og fáa avkastið sjálvir. Tá kann eitt oljuríkidømi við Føroyar skapa stóra menning her á landi, skapa fleiri túsund nýggj og áhugaverd arbeiðspláss og fáa til vega stórar peningaupphæddir til føroyska samfelagið, ið kunnu nýtast til at skapa karm um aðrar vinnur og eisini stovnar í framtíðarsamfelagnum, ið verður eitt informatiónssamfelag.

Støddin á føroyskari oljuvinnu

Ein føroysk oljuvinna kundi t.d. havt eina framleiðslu upp á 10 miljardir árliga, 2-2,5 miljardir í skattaavkasti (hetta svarar til alla okkara fíggjarløg) og 5000 arbeiðspláss í Føroyum. Ein slík oljuvinna hevði, um rætt varð atborið, kunnað skapað ein veldugan framburð í Føroyum og kundi verið stýrd so, at hon ikki tók lívið av øllum øðrum vinnum í landinum. Men ein slík føroysk oljuvinna er møguliga ov stór. Møguliga átti hon at verið minni enn hetta.

Ongan ognarrætt, einki oljuríkidømi

Hvussu danir - danska stjórnin - kemur at trumfa sín vilja ígjøgnum, liggur ikki fast enn. Men teir koma at gera tað, um ikki føroyingar fáa ognarrættin til oljuna. Hetta er líka so víst, sum at 2+2 er 4. Danir framdu yvirgang ímóti SEV, arbeiði skuldi gerast av donskum feløgum **upp á rokning** (tað bløða vit fyri enn í ólukkumát í okkara streymprísi) fyri, at donsk feløg kundu vinna eina upphædd upp á kanska eina miljard, og nýliga hava teir framt øll møgulig lokabrøgd fyri at sleppa undan eini bankaskuld hjá Den Danske Bank upp á 1,7 miljardir krónur.

At teir fara at lata okkum forvalta, stýra og fáa avkastið av møguligum oljuríkidømi upp á nøvar hundrað miljardir - kanska, sum í Hetlandi - tað kann einki menniskja páštanda við sínum fullu fimm sansum. Føroyingar skulu gera sær greitt, at danir rokna Føroyar sum danskt øki, tað eru teir, sum eiga hetta landið og alt, sum er her, og danir hava ongantíð enn umtalað møguligt oljuríkidømið við Føroyar sum føroyskar resoursir. Hesi møgulig oljuríkidømi verða konsekvent umtalað sum danskar resoursir.